## Nógv CO2 úr Grønlandi

Tey seinastu árini hava grønlendingar lagt stóran dent á at útbyggja námsvinnuna fyri at útvega samfelagnum fleiri inntøkukeldur. Men nú vísir ein frágreiðing, at hesin ídnaðurin kann gerast dýrur fyri Grønland. Frágreiðingin kemur til ta niðurstøðu, at CO2-útlátið frá námsvinnuni fer at kosta eina milliard krónur. Víst verður á, at tað nýggja aluminiumsverkið hjá Alcoa fer at lata 600.000 tons av CO2 út í umhvørvið um árið ella líka nógv sum alt tað grønlendska útlátið í dag. Kemur ferð á oljuvinnuna, kemur tað grønlendska CO2-útlátið heilt upp í 14,7 milliónir tons um árið, og tað fer at kosta Grønlandi milliardir í CO2-kvotum, stendur í frágreiðingini.




## Studentakvøld í Føroyahúsinum

Tað vera plátuvendararnir B.A.B.Y. og Billy the Kid, sum standa fyri tónleikinum, tá sokallað Studentakvøld verður í Føroyahúsinum í annaðkvøld. Føroyahúsið kallar tað ársins summarbrak fyri teimum yngri útisetinum í danska høvuðsstaðnum. Tað vera teir báðir Brynjolfur á Heygum og Mike Antony, ið kalla seg ávíkavist B.A.B.Y. og Billy the Kid, sum hava spælt ymsa staðni í danska høvuðsstaðnum seinastu tíðina, ið stýra tónleikinum í Føroyahúsinum fríggjakvøldið.

# Arbeiðsgevarafelagið vil sleppa undan stuðli

**Kjak hevur tikið seg upp um studning til vinnu, og nú sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at hetta er ikki eitt nýtt sjónarmið hjá felagnum, at vilja sleppa undan stuðullskipanum**



*Arbeiðsgevarafelagið vil sláa fast, at tað altíð hevur verið ímóti stuðulsskipanum*

**STUDNINGUR**

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur við grundarlagi í vinnupolitikki felagsins heilt frá 1990'unum havt tey sjónarmið galdandi fyri alla føroyska vinnu, at tað er avlagandi at lata vinnuni studning. Málið er, at vinnan skal gerast stuðulsfrí og kappingarfør mótvegis umheiminum og virka undir tryggum og kendum kørmum, sigur felagið.

Felagið leggur afturat, at í løtuni er føroyska handverksvinnan undir sera stórum trýsti. At eftirspurningurin eftir tænastum frá byggivinnuni er minkaður munandi, og at útlendskar fyritøkur fáa arbeiðini um landið. Avleiðingin er, at fyritøkur steðga, og fólk gerast arbeiðsleys. Hóast støðan er álvarsom, metir Arbeiðsgevarafelagið ikki, at tað er rætt at geva hesum parti av vinnuni studning.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir eisini á, at tað tekur ikki undir við sokallaðu fiskavirkisskipanini og heldur, at henda skipan eigur at takast av. Somuleiðis vísir Arbeiðsgevarafelagið á í vinnusjónarmiðunum frá 2002, at flutningsstuðulin er óheppin og avlagar flutningsmynstrið fyri fisk. Sannroynd er, at eftir, at skipanin við flutningsstuðli kom, hava flutningsfeløgini miðsavnað fráferðirnar frá meginøkinum í Føroyum og sigla ikki í sama mun um landið at heinta vøru til útflutnings.

- Stuðul til ávísar partar av vinnuni hevur ávirkan bæði á samfelagið sum heild, men eisini á aðrar vinnur. Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar meginpartin av føroyskari vinnu, og metir tað tí ikki bert sum sín rætt, men eisini sum sína skyldu at boða frá sjónarmiðum felagsins í hesum sambandi.

Felagið Trolskip hevur í tíðindaskrivi boðað frá, at felagið sær nakrar møguleikar fyri tillagingum. Hetta er at fegnast um og vísir vilja til at taka ábyrgd, sigur Arbeiðsgevarafelagið.


*Marjun Magnussen er nýggjur deildarstjóri í Almannamálaráðnum*

## Deildarstjóri settur í Almannamálaráðnum

**Marjun Magnussen er sett sum deildarstjóri í Almannamálaráðnum.**

Hon tekur við starvinum hálvan august. Marjun Magnussen er 34 ára gomul og útbúgvin løgfrøðingur. Marjun starvaðist í danska Arbejdsdirektoratet áðrenn hon í 2002 flutti til Føroyar. Hon hevur drúgvar royndir í føroysku miðfyrisitingini, har hon hevur starvast bæði sum fulltrúi og deildarleiðari. Síðan 2007 hevur Marjun verið leiðandi løgfrøðingur í bankunum Kaupthing og Eik Bank.

## Sangleikur um Varmakeldu

**Leikurin snýr seg um Varmakeldu – siðsøgu, sum er knýtt at kelduni, um marmenlar, fjørutrøll og um ta grøðandi megi, ið keldan hevur. Tað eru sættu flokkarnir, ið framføra**

Sættu flokkarnir í Fuglafjarðar skúla fara at spæla sangleikin: Varmakeldunátt í viku 26. Spælt verður hvørt kvøld kl 20:00 í Mentnarhúsinum í Fuglafirði - frá mánadegnum 22. juni til leygardagin 27. juni. Hendan dag verður sýningin eisini kl 16:00.

Skrivað leikin hevur Frits Johannesen. Í leikinum eru yrkingar av Petur Martin Petersen, Hilmar Petersen, Alexandur Kristiansen, Frits Johannesen og Hans Andreas Djurhuus.

Eyðun á Lakjuni hevur smíðað øll løgini , uttan Hjørtu, kvirr, nú setur sól. Orðini eigur Alexandur Kristiansen, lagið Th. Laub og Varmakelda, orðini eigur H. A. Djurhuus og Jógvan á Lakjuni hevur gjørt lagið.

Eyðun á Lakjuni hevur eisini lagt tónleikin til rættis. Ein tónleikabólkur verður við, har Høgni Klakkstein og Jan Rúni Poulsen hava slagverk um hendi, Bárður á Lakjuni spælir bass, Eyðun á Lakjuni klaver og Pól Wolles spælir gittar.

Pia Andersen, lærari hevur seymað búnarnar. Flokslærarar eru Eyðgerð Abrahamsen og Kjartan Sleire. Filmsupptøka, Kjartan Madsen og teskari, Mortan Berjastein